Ábøtur Innan Glyvur

Bøtt verður um gamla vegin Innan Glyvur millum Strendur og Skála. Ein millión er sett av til arbeiðið í ár

EDVARD JOENSEN

Vegurin Innan Glyvur fær stórar ábøtur
Mynd: Edvard Joensen

Innan Glyvur: Hjálpt verður nú upp á gamla vegin Innan Glyvur. Vegurin verður ræettaður út, so tað slepst undan teimum flestu svingunum, sum har eru.

Av vegumsitingini hjá Landsverkfrøðinginum á Lambareiði verður sagt, at arbeiðið, sum nú er í gongd Innan Glyvur er slíkt, sum rópt verður størri ábøtur. Gamli vegurin verður breiðkaður, so hann verður fimm metrar breiður.

Tó er ikki talan um nakra nýgerð. Nýggjur vegur er ætlaður at liggja oman fyri bygdirnar Skála og Innan Glyvur. Hann verður ætlandi lagdur frá svinginum innanvert ítróttarhøllina á Skála og bundin í breiða vegin Inni á Byrgi, teir kalla, oman fyri Hulk.

Tað, sum nú verður gjørt Innan Glyvur er, at verandi vegur verður breiðkaður í báðum síðum. Tó ikki allan veg. Men einastaðni niðan fyri og aðrastaðni oman fyri, alt eftir hvar bugur er á. Soleiðis er ætlanin at fáa vegin beinan og samstundis sleppa undan at koma í kløtur við hús og annað, sum er á vegnum.

Sum sagt verður av Lambareiði, er hetta bara umvæling, tí eingin grund er at fara undir nakað stórarbeiði, nú nýggjur vegur skal gerast kortini.

Av vegaumsitingini á Lambareiði verður sagt, at vegastrekkið frá Glyvur inn á Skála er tað ringasta, sum er fram við Skálafjørðinum í dag. Og har treingir sanniliga til ábøtur, tí væl av tungari ferðslu er, umframt nógvu ferðsluni annars. Trý fiskavirki eru á Strondum, og har koyra dagliga stórir bilar til og frá.

Landsverkfrøðingurin hevur fingið eina millión krónur til arbeiðið í ár, og so verður roynt at fáa sum mest fyri hesa milliónina, verður sagt av Lambareiði.

Her vil eg á gólvið fram

Dansitíðin byrjar nú aftur, og fleiri av dansifeløgunum eru farin undir vetrarskráirnar. Norðurstreymoyar Dansifelag byrjar veturin við almennum dansitiltaki um vikuskiftið

EDVARD JOENSEN

Hjá teimum, sum dáma føroyskan dans, er komandi tíðin hugalig. Tað er dansitíðin, sum byrjar aftur og varir til føstulávint.

Dansifeløgini fara undir sínar skráir, og almenn dansikvøld verða hildin víða hvar í landinum.

Í tíðindaskrivi frá Norðstreymoyar Dansifelag verður sagt, at felagið vanliga byrjar dansiveturin við einum felags dansikvøldi í bygdarhúsinum í Kollafirði um mánaðarskiftið september/oktober. Hetta er í grundini eitt alment dansikvøld, har bæði limir í egnum felag, øðrum dansifeløgum og fólk, sum bara hava hug at dansa, plaga at koma saman.

Tiltakið hevur verið sera væl eydnað og er vorðið ein fastur táttur í skrá felagsins, verður sagt í tíðindaskrivinum frá Norðstreymoyar Dansifelag.

Almenna dansikvøldið, sum Norðstreymoyar Dansifelag skipar fyri í Kollafirði í ár, verður nú leygarkvøldið 30. september.

Tiltakið byrjar klokkan 21.30 og heldur á, so leingi nakar er eftir á gólvinum, verður sagt.

Atgongumerkið kostar 50,- krónur. Men í prísinum er eisini ábit - smurt breyð við onkrum leskandi afturvið – á midnátt. Umframt ber eisini til at keypa sær sodavatn og øl eftir tørvi, siga tey frá Norðstreymoyar Dansifelag, sum vóna nógv fólk til almenna dansin í Kollafirði leygarkvøldið.



Nú byrjar dansitíðin aftur, og fólk fara upp á gólv
Mynd : Edvard Joensen

Farmaskip sum fóðurflaki

Farmaskipið Nordic fer at liggja á Funningsfirði sum fóðurflaki hjá alistøðini Funningslaks

EDVARD JOENSEN

Funningslaks hevur keypt farmaskipið Nordic frá Nordic Bulk í Havn. Ætlanin er tó ikki at fara undir farmasigling, men at brúka skipið í alivinnuni.

Ætlanin er at leggja skipið við aliringarnar, sum Funningslaksur hevur liggjandi undir Líðini uttalaga á Funningsfirði.

Nordic fer at liggja sum flaki við aliringarnar uttalaga á Funningsfirði
Mynd: Jens Kristian Vang

Har er í løtuni ein flaki, men hann verður skiftur út við Nordic sum er nógv størri og arbeiðsligari, sigur Kári Nielsen, stjóri á Funningslaksi.

Skipið fer so at taka fóður umborð og annars røkja somu uppgávur sum einhvør annar aliflaki, sigur hann. Funningslaks hevur umleið eina millión fiskar gangandi undir Líðini, har Nordic fer at liggja, sigur Kári Nielsen

Skipið fer at virka sum fóðurgoymsla til aliringarnar har úti fyri tað mesta. Men sjálvandi fer eisini at bera til at flyta ímillum, um tað verður neyðugt. Men skipið fer ikki at sigla, sigur Kári Nielsen. Tað verður í framtíðini ikki skrásett sum skip, men sum flaki, sigur hann.

Nordic stendur í løtuni á sleipistøð á Tórshavnar Skipasmiðju, har skrokkurin verður klassaður.

Ein orsøk til, at hann nú varð seldur, var júst tann, at hann stóð fyri umfatandi klassing, sum gomlu eigararnir ikki mettu lønandi. Sum skilst hugsa teir um at fáa sær annað og størri skip fyri Nordic.

Kári Nielsen sigur, at grundin til, at Funningslaks keypti Nordic, var tann, at skipið fekst bíliga. Hann sigur, at keypsprísurin var eitt sindur oman fyri ta hálvu milliónina. Slík skip eru bílig á marknaðinum í dag, sigur Kári Nielsen.

– Vit fingu einki gjørt

– Vit eru bara fegin um, at ættin var til vildar, so at eldurin ikki breiddi seg, sigur Súsanna í Bú›ini. Mikukvøldi› kom eldur í ein bygning hjá bóndahjúnunum á Velbasta›

Mikukvøldi› kom eldur í ein ambo›sbygning hjá bóndahjúnunum í Bú›ini á Velbasta›. Mynd: Álvur Haraldsen

EY›UN KLAKSTEIN

Velbasta›ur: Mikukvøldi› kom eldur í ein ambo›sbygning hjá Ey›finni og Súsannu í Bú›ini á Velbasta›.

Bóndahjúnini brúka hendan bygningin, sum var› bygdur fyri tveimum árum sí›ani til at goyma ymiskar maskinur og ambo› í.

– Ta› hendi ein ella onnur eksplosión, og eftir fáum minuttum stó› alt í ljósum loga. Vit fingu einki gjørt fyri at basa eldinum, á›renn hann ræettiliga hev›i fest í, grei›ir Súsanna í Bú›ini frá.

– Vit eru bara fegin um, at ættin var til vildar, so at eldurin ikki breiddi seg.

Maskinur fingu ska›a

Sløkkili›i› í Havn fekk bo›ini úr Velbasta› stutt eftir midnátt mikukvøldi› og fór í skundi á sta›i.

Men tá hev›i eldurin fingi› slíkar fastatøkur á bygninginum, at hann stó› ikki til at bjarga.

– Bygningurin er farin allur sum hann er. Vit hava tveir brunnar í ø›rum endanum av bygninginum, og teir eru eisini farnir. Sama er vi› traktorinum og ø›rum smærri maskinum, sum stó› inn har, sigur Súsanna í Bú›ini.

Okkurt var› bjarga út úr kjallaranum, men ska›in á bygningin er stórur, og hann má byggjast upp frá grundini av n‡ggjum.

– Tíbetur hava vit fjósi› hinumegin vegin, og tí vóru kríatúrini ikki í vanda.

Barnafrádrátturin hækkar í Klaksvík

Skattaprosenti› í Klaksvíkar kommunu ver›ur eisini næsta ár 20%, men barnafrádrátturin hækkar vi› 500 krónum

EY›UN KLAKSTEIN

Klaksvík: Klaksvíkar b‡rá› hevur vi›gjørt fíggjarætlanina fyri næsta ár, og uppskot er gjørt, sum skal sendast landsst‡rinum.

Ætlanin er at hava sama skattaprosent næsta ár, og ta› eru 20 prosent. Men barnafrádrátturin hækkar úr 2500 krónum og upp í 3000 krónur fyri hvørt barn.

Fíggjarætlanin javnvigar vi› 86,6 milliónum krónum. Gó›ar 21 milliónir skulu brúkast til lánsgjøld, 19 milliónir til íløgur og 47 milliónir til raksturin.

Klaksvíkar kommuna hevur varisliga mett skattainntøkuna næsta ár til 87 milliónir, og tí ver›ur rokna› vi› einum lítlum yvirskoti á fíggjarætlanini.

Íløgurnar

B‡rá›spolitikarnir í Klaksvík hava seinastu tí›ina arbeitt vi› at fáa íløgurnar upp á pláss.

Úrsliti› er, at skoti› ver›ur upp at brúka 19 milliónir til íløgur. Av hesum skal Klaksvíkar havn brúka gó›ar 3 milliónir, umvælingarnar á skúlanum á Ziskatrø› halda fram, og avsettar ver›a oman fyri 3 milliónir til ta›.

Útbyggingin av vatninum fær gó›ar 3 milliónir í 2001, og svimjihøllin skal umvælast fyri næstan hálva a›ru millión.

Harafturat ætlar Klaksvíkar kommuna eisini, at n‡ggj læknami›stø› skal gerast komandi ár.

Fíggjarætlanaruppskoti› ver›ur nú sent landsst‡rinum, sum skal gó›kenna allar fíggjarætlanina hjá kommunum.



Klaksvíkar kommuna hevur varisliga mett skattainntøkuna næsta ár til 87 milliónir, og tí ver›ur rokna› vi› einum lítlum yvirskoti á fíggjarætlanini.

HEIMA BIO



VIDEOTOP 10

VIKA 39

1 Jeanne d'Arc
2 American Beauty
3 The Bone Collector
4 Den grønne mil
5 Den sjette sans
6 Three to Tango
7 Blue Streak
8 Double Jeopardy
9 Kissing a Fool
10 The Haunting

Í Gundadali	tel. 31 47 70
Í Kollafirði	tel. 42 10 83
Í Saltangará	tel. 44 91 33
Í Klaksvík	tel. 45 73 53
Í Sørvági	tel. 33 20 01
Í Leirvík	tel. 44 33 60
Í Skálafirði	tel. 44 12 00

petur & petur 320870

STATOIL

støðirnar kring landið